# Áhugi fyri Hotel Norð

**Pf. Inni hevur fýra vinnu- og handilsbygningar á sølulistanum**

HANDIL
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tað gongur ikki so skjótt at selja vinnubygningar sum sethús, men í báðum førum hevur tað týdning, hvar bústaðurin er. Teir seinastu mánaðarnar hevur meklaravirkið Pf. Inni havt nakrar vinnubygningar á sølulistanum, men hóast teir standa har enn, merkir tað ikki, at eingin áhugi er, sigur stjórin í Pf. Inni, Jónsvein Mortensen.

Best kendi vinnubygningurin á sølulistanum er Hotel Norð á Viðareiði, sum eigarin, Jógvan Heinesen, hevur gjørt av at selja. Enn hevur Pf. Inni ikki fingið nakað boð upp á hotellið, men ein áhugaður keypari er kortini. Jónsvein Mortensen sigur, at tey hava júst útvegað eina frágreiðing um hotellið, og hvørjum standi tað er í, og hann væntar at frætta aftur í næstum.



*Enn hevur eingin bjóðað upp á Hotel Norð, men áhugi er fyri hotellinum.*

Hotel Norð er 1100 fermetrar í tveimum hæddum og er bygt í 1975 og í 1990. Hotellið hevur 15 dupultkømur og matstovu til 280 fólk.

**Bara eitt boð**

Hinir tríggir vinnubygningarnir, sum Pf. Inni hevur á sølulistanum, eru málaravirkið hjá Henning Sørensen á Argjum, bygningurin hjá JT Electric á Kambsdali og ein handilsbygningur miðskeiðis í Klaksvík.

Ein keypari hevur boðið 4 mió. krónur fyri málaravirkið á Argjum, men seljarin hevur ikki tikið av tilboðnum. Hesin bygningurin, sum er 733 fermetrar í trimum hæddum, er bygdur í 1990.

Bygningurin hjá JT Electric á Kambsdali er 1.000 fermetrar í tveimum hæddum og bygdur í 2002/3. Eigarin vil hava 7 mió. krónur fyri hann, men enn hevur Pf. Inni ikki fingið nakað boð.

Miðskeiðis í Klaksvík er ein handilsbygningur til sølu. Hann er 240 fermetrar í tveimum hæddum, og eigarin vil hava 4 mió. krónur fyri hann. Jónsvein Mortensen sigur, at onkur keypari hevur víst bygninginum áhuga, men enn er einki beinleiðis boð komið upp á hann.


